# Seyðakjak

POULINA SLÆTTANES

At geva seyðinum skyldina fyri bæði líkt og ólíkt í einum løgtingsuppskoti, ið nú liggur á tingborði, haldi eg vera langt úti. Hegn og stik skulu við hesum uppskoti, um tað verður samtykt, gera alt so nógv liviligari. Hesir ómælandi, ferføttu skapningar gera alt so tvørligt fyri føroyingar og fyri tey, sum búleikast aðrastaðni og ikki hætta sær at koma heim aftur vegna seyðaóskilið. Tað stendur í grundgevingini. Tað ljóðar bæði barnsligt og býttligt. Tað sker í oyruni.

At seyðurin skal elva til so nógv ”lort”, passar ikki. Tað verður nevnt í løgtingsuppskotinum, ið tingfólk úr samgongu og andstøðu hava sett fram, at seyðurin er til ampa og mangan orsøkin bæði til eitt og annað og til tað mest ræðuliga, - ferðsluóhapp. Tá danska tíðindakvinnan Line Baun Danielsen var her herfyri, hevði hon hoyrt, at føroyski seyðurin gekk og mól á flogvøllinum !!

Seyðurin hevur ”altíð” verið her. Tað kann skjalprógvast. Seyðabrævið kenna vit. Vit hava sálmar og sangir, har tikið verður til hann við jaligum vendingum. Yrkisbókmentir um seyð og seyðahald eigur neyvan nøkur onnur tjóð betri lýstan enn tann føroyska. Í okkara føgru bókmentum eigur hann eisini sítt pláss. Og vit taka íðuliga til tann góða heystar – og vetrarverðan, sum er nakað heilt serligt, ræsta kjøtið og rótasúpanin. Og oyggjarnar eru uppkallaðar, sigst, eftir hesum ómælandi, ferføttu kríatúrum, ið altíð hava havt frælsi í fjøllum og grønum líðum at lívbjarga sær í.

Men so komu ”seyðaoyggjarnar” til ta niðurstøðu, at vit skuldu hava vegir, tunlar og brýr. Sjálvandi skuldu vit mennast og byggja út. Men fara vit um ferðslunetið við skynsemi ? Skal tað eita, tá eitt óhapp hendir, at orsøkin var seyður á vegnum, um tað kanska eisini var orsøkin? Hví ikki siga tað bart út, - at koyrt var ikki eftir reglunum? Hámarksferð og tað verður yvirhøvur ikki hildið. Tað verður jabbað upp í saman at koyra eftir umstøðunum, men tað verður tað bara alt ov sjáldan. Koyrt verður púra svakt, - harur, tjøldur og másar, ja, hvørt um annað liggur javnan ”splattað” millum bygdir, og tað eru eingi onnur enn tey ferhjulaðu gummidekkini, ið orna tað. Seyður liggur eisini úti á vegjaðaranum lívleysur. Neyvan tí at hann gekk mitt á vegnum, men heldur tí, at ”deyðshóttanin”, bilurin, varð so mikið nógv løddur og slapp at gera bart. Hálkan skal sjálvandi eisini hava skyldina. Hon svarar heldur ikki aftur. Her manglar fyrilit, so tað stendur eftir í.

Kann í hesum sambandi eisini nevna hesar skjóttgangandi spitbátarnar, ið týna og drepa alt fuglalív í bjørgunum. Tað er ferð og tað náðileys, ið fær fastatøkur á tí ferðandi og feiar tann óhjálpna, verjuleysa, ómælandi skapningin burtur!!!

Vil gjarna taka undir við, at vetrarfriðing, ið nú verður so nógv umrødd, er sømilig og røtt. Flestu hagapartar duga at skilja, at tað er neyðugt nú. Men at kasta seyðunum allan henda ”lort”, sum í uppskotinum stendur, er langt úti.

Haldið tykkum til ferðslureglarnar, koyrið eftir umstøðunum og gerið eitt floyt, tá ein ær fer yvir um vegin og lambið kanska aftaná. Seyðurin er so mikið at sær komin, at hann skilir boðskapin !!!

# Trygvi Guttesen roynir at flyta fokus

JÓANNES EIDESGAARD



Ein av gomlu og trúgvu bakkunum í sambandsverjuni Trygvi Guttesen hevur grein um, at Javnaðarflokkurin er í tvístøðu, tá tað snýr seg um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Eg og ivaleyst mong við mær vita, hví ein slík grein kemur beint nú. Hetta er einki annað enn ein roynd at flyta fokus frá okkara veruligu trupulleikum. Ríkisrættarliga støðan er so ikki nakar trupulleiki, so vítt eg skilji støðuna..

At ríkisrættarliga støðan millum Føroyar við Danmark ikki er nevnd í okkara samtykt frá landsfundinum, er væl besta tekin um, at vit hava havt ein góða landsfund við tí rætta innihaldinum. Ríkisrættarliga støðan er ikki eitt mál, sum vit í javnaðarumhvørvinum brúka so drúgva tíð uppá. Vit hava onnur og munandi meira týdningarmikil mál at viðgera, enn um vit skulu loysa ella knýta okkum fastari at dønum. Tað málið kunnu Tjóðveldi og Sambandsflokkurin undirhalda okkum við eina aðru ferð. Vit hava annað at brúka tíðina til.

Tá Trygvi Guttesen nevnir, at tað er bara tveir flokkar, sum hava markantar støður í hasum spurninginum um loysing og samband, so hevur hann ivaleyst rætt. Men um hetta gerst einasta politiska innihaldið, so er soðið tunt.

Vert er at geva gætur, at undanfarna ABC-samgonga, sum eg var løgmaður fyri, loysti hatta málið fyri framtíðina. Her er einki at klandrast um longur, tí Yvirtøkulógin gevur okkum føroyingum fulla heimildir til at fremja tær yvirtøkur, sum vit vilja. Dømi um hetta var tingfundurin í hesi vikuni, har ein sambandsløgmaður legði uppskot fram um at fremja yvirtøkur við heimild í hesi somu lóg.

So Trygvi Guttesen, at vit í Javnaðarflokkinum ikki gera so nógv burtur úr hasum meira enn 100 ára gamla klandursmálinum, so er tað tí, at vit ikki duga at síggja, at tað eigur at fylla so nógv. Vit hava sera trupul mál at loysa í samfelagnum, her og nú, bæði hvat framtíðar vælferð og búskapi viðvíkur. Tað er vánaligt politiskt handalag nú at flyta fokus frá hesum málum til eitt mál, sum als ikki hevur nakran sum helst týdning fyri okkara støðu.

Latum okkum brúka politiska orkuna rætt.

# Børn og ung niðan í Mjørkadal??

SJÚRÐUR JOHANNESEN
Sosialráðgevi

Veit ikki um eg eri frekur, men loyvi mær at halda at børn og ung við serligum tørvi er eitt øki eg havi eitt sindur av skili fyri, í hvussu so er havi eg nógvar royndir á økinum.

Havi lisið, sæð og lurta eftir kjakinum um flytingina av Rókini og Slóðini niðan í Mjørkadal og tað ið er komið mær til hugs er, at hetta kjak minnir um tað kjaki ið var um bókina “Kamerat Jesus” ið ætlanin var at umseta, haldi tað var úr svenskum til føroyskt fyrst í 80 inum.

Hetta var ein skandala, óvanliga nógv høvdu eina meining um at bókin var gudsspottandi og vandamikil hjá børnum at koma í nánd av. Men felags fyri tey flestu ið høvdu eina meining var, at tey høvdu als ikki lisið bókina!

Nakað tað sama hendi tá gríma framførdi tær sokallaðu ginu-søgur.

So kjaki um at flyta Rókina og Slóðina niðan í Mjørkadal er eftir míni hugsan eitt vanligt føroyskt kjak, har nógv verður oyst út, uttan at vita hvat í veruleikanum verður tosa um.

Eg kundi gott hugsa mær, at sagt mína erligu meining um tað er rætt ella skeivt at flyta stovnarnar niðan í fjøllini, men so má eg vita hvat fyri hugsan liggur aftanfyri. Hvat fyri pedagogiskar tankar hava tey ið standa aftanfyri hesa ætlan gjørt sær o-sfr.

Hvat eru tað fyri børn og ung vit tosa um? Er tað tað Íslendska koncepti ið er grundtankin? Hvat siga starvsfólkini á Rókini og Slóðini? Her hugsi eg um tað fakligu argumentini við børnum og ungum í fokus.

Hvat siga serfrøðingarnir?

Hvat siga tey avvarðandi?

Eg eri ikki í iva um, at fyri nøkur ung, kundi Mjørkadalur verið eitt fantastiskt umhvørvi at fóta sær í lívinum saman við dugnaligum starvsfólkum, meðan fyri onnur er tað møguliga minni gott.

Men her eru so nógvir ósvaraðir spurningar og so fáar fakligar grundgevingar, at ongin eftir míni hugsan er førur fyri at siga hvat er hvat í hesum málið.

Tí skal mín áheitan til tykkum ið vara av hesum øki. Tosi við serfrøðina allan vegin runt /(ikki bara ein fakbólk og gloym ikki tey avvarðandi og tey ungu sjálvi ) Minnist til at hava børnini og tey ungu og teirra tørv í fokus alla tíðina.

Føroyar eiga eina rúgvu av dugnaligum starvsfólki innan nærum øll fak- økið. Hesi arbeiða dagliga við ungum við serligum tørvi.

Spyrji tey og brúki tey, so koma tit víðari, vit vita í hvussu so er, hvør rindar prísin meðan kjaki koyrir og alt stendur í stað.

# Fækka ferðatúrarnar til Sandoynna?

EYÐUN MOHR VIDERØ



**Vit frætta nú, at talan er um at lata Teistan sigla færri túrar til Sandoynna, fyri lutvíst at bjarga vánaligu fíggjarstøðuni hjá landinum!**

Mær er sagt, at hetta snýr seg um at flyta part av mannskapinum frá Teistanum yvir á Ternuna, nú hon ætlandi skal røkja nólsoyarleiðina, tó uttan at tað skal kosta strandferðsluni fleiri pengar, tí Ternan krevur størri mansskap sambært galdandi manningarlóg. Og Ritan skal røkja leiðina Svínoy/ Fugloy.

Tað skal væl skiljast soleiðis, at Sandoyarleiðin skal ofrast, fyri at halda javnvág í roknskapinum!

Hvat vil hetta so siga fyri Sandoynna. Hjá eldri monnum sum mær hevur tað ikki so stóran týdning, nær eg sleppi um fjørðin, men tað avgerandi er hjá yngra ættarliðnum, sum hevur smá børn at taka sær av, og at fíggja sítt heim, men noyðist av oynni til arbeiðis. Hesi skulu frá morgninum leggja sær arbeiðstíðina til rættis í samráð við arbeiðsgevara, og við tey, ið passa børnini á barnagarði v.m..

Henda skipan er lagað til ferðamynstri í løtuni, og ivaleyst hevur tað verið trupult hjá fleiri at fáa í lag, um ikki sera góður samarbeiðsvilji var.

Fyri at gera hetta møguligt játtaði løgting og landsstýri áður pening til meirkostnað til fleiri túrar um fjørðin, og hesum hava serliga yngri fólk í oynni laga sín bústaðarpolitikk eftir. Hetta var eisini gjørt, so fólk ikki vórðu tvingað av oynni at búgva. Hetta var eisini ein ásannan av, at oyggin átti at varðveitast sum búsetur hjá hesum partinum av Føroyum.

Vit hoyra frá politikarunum, at hallið á fíggjarløgtingslógini fyri komandi ár fera at snúgva seg um einar 800 mió. kr. Her ætlar man at ofra Sandoynna fyri at spara 2 mió. kr.

Eg klári ikki at fylgja tankagongdini hjá okkara politikarum og strandferðslu, og skilji eg støðuna rætt, so má staðfestast, at hesi ikki eru før fyri at stýra okkara lítla oyggjasamfelagi.

Ella hugsi tykkum um eina ferð enn og ásanni, at hetta fólk og oyggj er ein virðiligur partur av landinum, sum ikki má strikast fyri at spara 2 mió. kr. meðan samlaða hallið snýr seg um 800 mió.kr.!